Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Sirið Stenberg, landsstýriskvinna í almanna- og mentamálum

Evni: Bandasavnið hjá Kringvarpinum og aðrar gamlar upptøkur

Spurningar:

1. Hvørjar møguleikar sær landsstýriskvinnan fyri, at talgilda bandasavnið hjá Kringvarpinum kann gerast atkomuligt hjá almenninginum ?
2. Hvørjar møguleikar sær landsstýriskvinnan fyri, at aðrar gamlar upptøkur, so sum tónleikaupptøkur, kunnu verða atkomuligar hjá almenninginum?
3. Verður arbeitt við at gera hesi søvn atkomulig?
4. Um arbeitt verður við hesum, nær kann so roknast við, at arbeiðið verður liðugt?

Viðmerkingar:
Í fleiri ár hevur verið arbeitt við at talgilda bandasavnið hjá Kringvarpinum. Hetta arbeiðið er nú liðugt, men enn manglar seinasta stigið, sum er at gera upptøkurnar atkomuligar hjá øllum brúkarum. Talan er um stórt mentanarligt virði, sum er savnað og talgilt, og tí eigur seinasta stigið eisini at verða tikið, so at allir føroyingar kunnu fáa gleði av tí.

Eisini eru nógvar virðismiklar tónleikaútgávur gjørdar gjøgnum tíðina, sum ikki longur kunnu keypast. Við nútíðartøkni hevði borið væl til at savnað og talgilt hesar, og saman við savninum hjá Kringvarpinum at gjørt tær atkomuligar hjá øllum.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, tann 6. august 2024

Helgi Abrahamsen
løgtingsmaður